tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 139 Týsdagur 23. juli 1996 | 70. árgangur | Krónur 7,00

## Gott at læra uttanlands

*MFS er eitt livandi felag, sum ger vart við seg*



*Frá framsýningini.*
*Her Armgarð Weihe, sum lærir tekstildesign*

Síða 6

## Danskt sjóverjuskip við í oljuleiting við Føroyar




*»Thetis« skal gera seismiskar kanningar saman við einum Westernskipi*

Síða 9

**Vandi á ferð:**

# SvF endar sum lokalstøð hjá DR

SvF hevur ikki arbeiðsorku og pening til at senda frá ólavsøkuni, sigur Johan Petersen, formaður í Sjónvarpsnevndini. Hann heldur tað vera ein politiskan spurning, um vit skulu hava eitt føroyskt sjónvarp ella ikki. Vandi er fyri, at SvF endar sum lokalstøð hjá DR, verður ikki okkurt gjørt frá politiskari síðu

Síða 3

*Formaðurin í stýrinum fyri Suðuroyar Sjúkrahús:*

# Maktsjúka forkemur Landssjúkrahúsinum

– Eg hevði ikki lagt mín gamla hund undir skurð á Landssjúkrahúsinum, sigur Kaj Ljósstein, formaður í stýrinum fyri Suðuroyar Sjúkrahús, sum heldur, at viðurskiftini á LS nú mugu setast upp á pláss

Síða 5

VØRUKOYRING
FLYTING
ÚR FØROYUM
TIL FØROYA
Goymsla &
Flytikassar
TILBOÐ verða givin
Lagaligir prísir!
Pf. HP trading
TRANSPORT
Tlf. 17272
Fax 15009




Leiga eini frítíðarhús



nordica
Handilsleiðarnin




Nyggjar føroyskar flogur til Olavsøku
"MOIRAE" : "SAFIR"
149:-
TUTL



*Western undir nýggjar seismiskar kanningar við Føroyar:*

# Danska Thetis skal skjóta seismikk her

*Stóra amerikanska seismikkfyritøkan Western, sum stóð fyri umfevnandi kanningunum av føroysku undirgrundini í 1994 og 1995 fer nú eitt týðandi stig víðari við sínum kanningum og fer í næstum at skjóta seismikk við tveimum skipum. Annað av skipunum er danska sjóverjuskipið Thetis, sum kemur á Sund eftir útgerð í vikuni. Kanningarnar eru í samstarvi við oljufeløg sum Amerada Hess og danska Dong*

Jan Muller

Áhugin fyri at gera seismiskar kanningar í føroysku undirgrundini er sera stórur. Í næsta mánað fer stóra amerikanska seismikkfyritøkan Western Geophysical undir nakrar heilt nýggjar og spennandi kanningar við tveimum skipum.

Western er felagið, sum í 1994 og 1995 gjørdi seismiskar kanningar á øllum Føroyaøkinum fyri føroyskar myndugleikar.

Tær kanningarnar vóru eisini fyrsta miðvísa seismiska kanningin av føroysku undirgrundini við tí fyri eygað at útvega sær vitan um møguleikan at finna olju og gass í undirgrundini.

Kanningarnar, sum kostaðu felagnum 60 mill. kr., eru síðani vorðnar seldar til eina rúgvu av oljufeløgum - og eru tær sum so sjálvt grundarlagið undir teimum víðari forkanningunum, sum í løtuni fara fram og sum skulu gerast í næstum eisini.

**Loyvir sær at gera íløgur her**

Western, sum ikki hevur gjørt stóru íløguna á føroyskum øki til fánýtis, seismiska tilfarið frá kanningunum hevur nevniliga gingið sum heitt breyð, heldur føroyska økið vera so mikið áhugavert, at tað nú saman við nøkrum oljufeløgum fer undir eina nýggja seismiska kanning, sum lítið er roynd áður.

Talan er um at útvega sær data yvir eitt øki uppá 2000 kilometrar í sektorunum A og B í tí upprunaliga kanningarøkinum og síðani viðgera kanningartilfarið á høvuðsstøðini hjá Western í London.

Tað mest áhugaverda við hesi kanningini er, at Western fer at brúka nýggja tøknifrøði, sum ikki er brúkt oftani fyrr. Til tess er neyðugt at brúka tvey skip í senn.

Talan er um sokallað "long offset" kanning, har teir við serstakari útgerð og arbeiðshátti verða betri førir fyri at koma niður undir basaltið og harvið betur kunna síggja - tulka løgini har.

Samanumtikið skal slík kanning geva eina nógv klárari og betri mynd av løgunum undir basaltinum.

**Klárt við árslok**

Western sigur í tíðindaskrivi, at teirra tulking av komandi kanningartilfarinum verður klárt við árslok, soleiðis at hetta nýggja tilfarið um føroysku undirgrundina kann vera áhugaverdum oljufeløgum í hendi undan eini møguligari lisensrundu í 1997.

Um nýggja seismiska kanningin við Føroyar fer at vera væleydnað, so kann tað hava við sær, at úrslitini fara eisini at hjálpa oljufeløgunum í arbeiðinum at kanna onnur líknandi øki við tjúkkum basaltfláum á Atlantsmótinum t.v.s. í økjum út fyri Miðnoreg, vestan fyri bretsku oyggjarnar og vestan fyri Írland.

**Amerada Hess og Dong**

Nýggja seismiska kanningin verður gjørd í samstarvi við eitt av teimum stóru og mest virknu oljusamtøkunum, ið arbeiða á føroyska økinum. Talan er um tey fýra oljufeløgini, Amerada Hess, (og her eisini nýstovnaða Amerada Hess Faeroes Limited), Lasmo, Norsk Hydro og Dansk Olie- og Gasproduktion ella betri kent undir felagsheitinum DONG.

Ætlanin er at brúka tvey skip í kanningini. Annað teirra er Western Cowe, meðan hitt er danska sjóverjuskipið Thetis.

Thetis hevur í eina tíð verið leigað út til oljufelagið Nunaoil og hevur gjørt seismiskar kanningar í Grønlandi.

Men nú kemur Thetis so til Føroya, ikki til at røkja vaktartænastuna, men til at skjóta seismikk.

Thetis er umbygt og útgjørt til slíkar kanningar og kemur á Sund 25. juli eftir serútgerð frá Western.

Ætlanin er so at Thetis skal byrja kanningarnar 29. juli og halda fram til endan av september mánað.



*Gavin Hills Jones, stjóri hjá Western: -Komandi kanningarnar gagna øllum pørtum í eini komandi lisensrundu við Føroyar*

**Western vil halda fram í Føroyum**

Stjórin hjá Western fyri nýggjum økjum Gavin Hills Jones sigur seg vera sera væl nøgdan við arbeiðið í føroyska økinum.

-Vit eru væl nøgdir við, at vit kunnu halda fram við sambandinum og kanningunum við Føroyar, nú vit í meira enn tvey ár hava staðið fyri seismiskum kanningum av øllum økinum. Tað er vón okkara, at vit við hesum nýggju kanningunum kunnu fáa betri kanningartilfar at arbeiða við, sum aftur kann gagna øllum pørtum, sum hava áhuga at vera við í einum komandi útbjóðingarumfari.

Hóast Western ger kanningarnar saman við Amerada Hess samtakinum, so hava onnur oljufeløg eisini møguleika at keypa tilfarið, tá hetta verður klárt seinni í ár.



*Thetis er líkt Vædderen men er nakað umbygt til at kunna arbeiða sum seismikkskip*


PRICEBUSTERS
Vit hava stórt úrval av:
LEIKUM · AMBOÐUM · POSTALÍNI
eftirgjørdum BLÓMUM · RAMMUM
SPEGLUM · KØKSBÚNÝTI · TASKUM
og mongum øðrum

| | |
|---|---|
| Skúlataskur | úr kr. 29,95 |
| Útvarpstól | úr kr. 59,95 |
| Vekkara ur | úr kr. 29,95 |
| Kodak filmar | úr kr. 19,95 |
| Kodak Gold | úr kr. 29,95 |
| Panasonic battari t.d. 4 stk. Penlite | kr. 9,95 |
| Hamarar | kr. 39,95 |
| Hondsag | kr. 29,95 |
| Topplyklasett | kr. 49,95 |

Góða Ólavsøku ynskir
Sp/f Mangt & Hvat
TÓRSHAVN N. Finsensg. 25 · KLAKSVÍK N. Pálsg. 20 · Vágur



MØTLAR
Vit seyma møttlar.
Nakrir eru á goymslu
Tlf. 24724 / 24599